Herfølge tapti stórt

Superligan: Men Jákup Mikkelsen og teir eru framvegis klárt á odda. Hóast FCK vann, so eru Todi og teir framvegis niðarlaga á talvuni

Herfølge fekk ein orduligan undir vangan, tá teir sunnudagin seint seinnapartin vóru á útivølli í Gladsaxe. AB vann 3–0, men hóast Herfølge tapti stórt, so eru teir framvegis greitt á odda, og nú tað resta nígggju umfør eru teir framvegis besta boðið at vinna DM.

Tað skal hepni til at vinna DM, og hvat úrslitunum hjá kappingarneytunum viðvíkur er Herfølge heppið. Brøndby og Lyngby fingu bæði bara eitt stig. Tað vil við øðrum orðum siga, at fjarstøðan frá teimum og fram við Herfølge er seks stig.

Tvær ferðir upp í slag hevur Brøndby í síðstu løtu fingið javnleik, eftir at teir hava verið aftanfyri. Í Viborg vóru teir tvær ferðir á odda, men heimaliðið javnaði báðu ferðirnar. Stig Inge Bjørneby, norski kantspælarin sum Brøndby hevur fingið úr Liverpool, skoraði bæði málini.

Í Aalborg hevði heimaliðið greiða yvirvág, og teir misnýttu eina rúgvu av møguleikum. Men teir í Lyngby vóru hepnir og fingu javnleikin, sum ber í sær, at teir framvegis eru við millum teirra, sum elta Herfølge.

Men nú er tað ferðalagið farið at fjølgast. Við sigrinum á Herfølge kom AB upp á sama stigatal sum Brøndby og Lyngby, og tað gjørdi Silkeborg eisini. Teir vunnu tepran, men alíkavæl sannførandi 1–0 sigur á OB, sum stríðist fyri at sleppa leyst úr botninum.

Todi í ein tíma

FCK hevur ilt við at lætta sær úr áttanda plássinum, sum teir hava havt síðani undan vetrarsteðginum. Sunnudagin vóru 12.171 áskoðarar í Parkini og sóu FCK vinna 3–1 á botnliðnum úr Esbjerg. Sigurin ber við sær, at tað FCK hevur langt sjey stig millum seg og niðurflytingar strikuna.

Hol kom ikki á fyrrenn í 47. minutti, tá norðmaðurin Harald Brattbakk legði heimaliðið framum.

Todi spældi á miðvøllinum í vinstru fyrsta tíman. So varð hann avloystur av Peter Christiansen. Tað var hesin sum í síðstu løtu staðfesti 3–1 sigurin.

Esbjerg javnaði til 1–1, tá 67 minuttir vóru farnir, og í 72. minutti legði Carsten Hemmingsen FCK framum 2–1 upp á brotsspark. Dómurin, sum vísti seg at vera avgerandi fyri gongdina, varð sagdur at vera ivasamur.

Hýrurin á áskoðarunum hjá heimaliðnum var sjálvandi góður, men tey vóru ikki vitni til stórt fótbóltsundirhald.

FCK skal í eldin aftur í steypakappingini í annaðkvøld, tá teir á heimavølli skulu spæla ímóti AB, sum í síðstu viku sendi Herfølge úr steypakappingini. Mánakvøldið skulu teir spæla á heimavølli í landskappingini ímóti OB.

Kiksaðu

Herfølge kendi ikki sína vitjunartíð í Gladsaxe. Gestirnir løgdu fyri sum eitt ódnarveður. Teir høvdu fleiri upplagdar møguleikar, og tað ber væl til at imynda sær, at Jákup Mikkelsen nú fer at fáa høvi aftur at skjóta brotsspark. Eitt korter var farið, tá Herfølge fekk gylta møguleikan úr ellivu metrum at seta hol á, men skotið hjá Jens Madsen var vánaligt.

Eftir misnýtta brotsparkið místi Herfølge púra takið. Í 31. minutti setti Abdul Sule hol á, og hann var høvuðsmaður í støðuni sum, tá seinna umfarið var ellivu minuttir gamalt, bar avgerðina við sær, at stigini skuldu vera eftir hjá AB. Dómarin bríkslaði fyri brotssparkið, tí hann metti ein av verjuspælarunum hjá Herfølge at hava skumpað álopsmannin í ryggin, og Brian Steen Nielsen sendi úr ellivu metrum Jákup Mikkelsen annan vegin og bóltin hin vegin.

Sjónvarpsmyndirnar vístu týðuliga, at talan var ikki um brotsspark, men heldur um glantrileik.

John Faxe Jensen (hann spældi ikki sjálvur við hesa ferð) flutti fólkið fram, so Herfølge síðsta tíman var í 2–4–4 uppstilling. Hetta hevði spentar støður við sær í báðum endum, og tað var bara AB, sum fekk mál. Í ein móti einu støðu megnaði Jákup Mikkelsen at verja fyri, men bólturin støkk út til Brian Steen Nielsen, sum sendi flatt millum beinini á málverjanum, ið var á veg inn aftur á strikuna.

Sunnudagin skal Herfølge spæla á heimavølli móti AaB.

JH

Jákup Mikkelsen og teir úr Herfølge taptu um vikuskiftið, men heldur ikki nærmastu kappingarneytarnir fingu fulla úrtøku úr sínum dystum

Danska superligan, úrslit

Aab-Lyngby 1-1
FCK-Esbjerg 3-1
Silkeborg-OB 1-0
Viborg-Brøndby 2-2
AB-Herfølge 3-0
AGF-Vejle
(leiktur eftir evstamark)

	dystir	v	j	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1 Herfølge	23	13	4	6	38	33	5	43
4 Silkeborg	23	10	7	6	39	22	17	37
2 Brøndby	23	10	7	6	40	28	12	37
5 AB	23	10	7	6	37	27	10	37
3 Lyngby	23	11	4	8	37	31	6	37
6 Viborg	23	9	6	8	33	34	-1	33
7 AaB	23	7	11	5	33	26	7	32
8 FCK	23	9	4	10	31	24	7	31
9 OB	23	5	9	9	19	29	-10	24
10 AGF	22	5	6	11	20	35	-15	21
11 Esbjerg	23	6	3	14	24	42	-18	21
12 Vejle	22	3	10	9	24	45	-21	19

Heðin á Lakjuni skeyt tvey av KÍ-málunum suðuri í Sumba

KÍ málverjin sá reytt beinanvegin

Løgmanssteypið: *Men hóast meistarnir vóru undirmannaðir og fingu eitt mál ímóti sær beinanvegin, so var eingin ivi um, hvønn veg tað bar í Sumba*

Gunnar á Steig setti ivaleyst met sunnudagin. Og KÍ málverjin er neyvan serliga fegin um metið. Jens Petur Brattalið hevði akkurát bríkslað fyrstu ferð, tá Eirikur Joensen fór aftaná langari sending. KÍ málverjin kendi seg noyddan at leypa út, og tá hann í kroystari støðu vardi uttanfyri brotsteigin, var einki annað at gera hjá dómaranum enn at toga reyða kortið úr lummanum.

Klaksvíkingar høvdu bara ein málverja við til Sumbiar. Tí var neyðugt hjá Fríðini Ziskason, sum hesa ferð hevði fingið møguleikan í miðverjuni, at fara í málverjubúnan. Útvísingin hevði við sær, at Tomislav Sivic noyddist at broyta liðið. Niclas Niclassen fór í miðverjuna, Harley Bertholdsen fór aftur á vongverjan, og so spældi KÍ 4–3–2 í 88 minuttir.

Í fyrsta álopinum eftir útvísingina skoraði Eirikur Joensen, og so kundi hugsast, at heimaliðið fór at seta seg á dystin. Men soleiðis gekk tað ikki. Tað var skjótt, at tað sást, at tyngdin í spælarunum hjá KÍ var størri, klaksvíkingarnir fingu tak á, og hóast talan ongantíð var um flótandi fótbóltsspæl, so var eingin ivi um, hvør fór at vinna.

Sumbingar tóktust eitt sindur ørkymlaðir av støðuni. Eirikur Joensen sá reytt stutt undan steðginum, tí hann hevði sagt ov nógv, og so var spurningurin í 2. hálvleiki bara, hvussu stórur sigurin hjá KÍ fór at vera.

Ove Nysted javnaði upp á langskot í besta Kurt Mørkøre stíli, Heðin á Lakjuni, sum fleiri ferðir rann frá verjuni, skoraði tvey mál – annað upp á eitt fínt langskot – og tá Jan Joensen og Marek Vierzbicki øktu til 4–1 og 5–1, hevði Rógvi Jacobsen báðu ferðirnar drigið til baklinjuna og spælt út frá.

Í 2. hálvleiki komu Jógvan á Lakjuni og Símun Waag Høgnesen inn á KÍ liðið.

Sumbingar høvdu Eigil Olsen, sum áður hevur spælt í yngru deildunum hjá HB, í málinum. Og so var tað merkisvert, at veteranurin Marlon Kjærbo aftur hjálpir barndómsfelagnum. Hann spældi við TB í fjør.

Í 2. hálvleiki setti Sumba tríggjar nýggjar menn inn. Teir vóru Bergur Vinther, Heini Vestergaard og René Thomsen. Eftir 79 minuttir minkaði Bibi um munin. Hann gjørdi nyttu av returinum frá Fríðini Ziskason, sum hevði hálvbjargað roynd frá Heina Vestergaard

Sumba: Eigil Olsen – Trygvi Nielsen, Marlon Kjærbo, Páll Magnar Kjærbæk, Spasojé Biberdzic, Mortan úr Hørg – Nikola Biberdzic, Hallur Dam Joensen, Hans Jákup Thomsen, Eirikur Joensen – Birgir Jørgensen

KÍ: Gunnar á Steig – Niclas Niclassen, Fríðin Ziskason, Jan Andreasen, John Ryan – Marek Vierzbicki, Jan Joensen, Rógvi Jacobsen – Harley Bertholdsen, Ove Nysted, Heðin á Lakjuni

JH

NSÍ tvey mál í síðstu løtu

Løgmanssteypið: *Undirmannaðir vágbingar trýstu nógv í 2. hálvleiki, men síðstu løtuna fingu teir ein dyggan undir vangan*

Hóast vágbingar í meiri enn ein hálvan tíma vóru undirmannaðir, so sá tað fimm minuttir fyri leiklok út til, at teir skuldu fáa løn fyri, at teir mest sum alt seinna umfarið høvdu trýst spælið yvir á hálvuna hjá NSÍ.

Útjavnandi málið fingu teir eftir fríspark úr høgru. Milan Kulic legði innfyri, og eftir øgiligan ruðuleika, har fleiri lógu eftir á vállinum, eydnaðist tað Eyðun Jacobsen at pota bóltin inn um Rúna Joensen, NSÍ málverjan, sum var ein av teimum, ið hesa løtuna lá á vøllinum.

At VB síðani 57. minuttin hevði verið undirmannað komst av, at miðvallarin Tórður Holm sá reytt, tí hann eftir nærdyst hevði hevnt seg. Harmuligt og ivaleyst kostnaðarmikið hjá VB, sum sunnudagin spældi uttan Krzystof Popczynski, sum var leikbannaður eftir reyða kortið móti KÍ.

Tá fyritreytirnar vóru soleiðis, var tað skiljandi, at vágbingar fegnaðust um útjavnandi málið. Men fagnaðurin mundi vera í so stórur. NSÍ gav bóltin upp, Eddie Mikkelsen, sum var komin á vøllin tíggju minuttir frammanundan, sendi móti málinum, og Christian Høgni Jacobsen var fyrstur á returinum, eftir at Bjarni Johansen hevði hálvbjargað.

So flutti VB alt fólkið fram, og í síðstu løtu økti NSÍ um munin. Innskifti Mortan Hansen var púra kaldur, tá hann hevði eitt kúfóður fyri seg sjálvan. Álopsmaðurin, sum var komin á vøllin tjúgu minuttir frammanundan, fór framvið málverjanum, áðrenn hann trilladi bóltin í kassan.

Longu í 3. minutti setti NSÍ hol á. Gert Langgaard stakk bóltin inn um verjuna, og miðvallarin Ian Højgaard skoraði. Løtuna aftaná hevði NSÍ fýra stórar møguleikar, men Ian Højgaard og Christian Høgni Jacobsen misnýttu.

Tá hálvur tími var farin, kom VB fyri seg. Teir fingu nógv betri tak á, teir trýstu nógv, men tað var ikki ofta, at teir settu nýggja málverjan hjá NSÍ undir stórt trýst. Longu tá 22 minuttir vóru farnir noyddist Kári Hansen hjá NSÍ at taka seg burturúr. Brynjolvur Nielsen loysti hann av.



VB: Bjarni Johansen – Mikael í Lágabø, Eyðun Jacobsen, Magni Jacobsen – Palli Augustinussen, Janus Kjærbo, Tórður Holm, Milan Kulic, Petur Óli Samuelsen– Jón Pauli Olsen, Robert Cieslewicz

NSÍ: Rúni Joensen – Kári Hansen, Dánial Hansen, Arnfinn Langgaard, Sjúrður Jacobsen – Sonni L. Petersen, Djóni N. Joensen, Ian Højgaard, Jónstein Petersen – Gert Langgaard, Christian Høgni Jacobsen

JH

B68 gjørdi skjótt av

Løgmanssteypið: *Øll fimm málini á Svangaskarði komu í fyrra umfarinum. Eftir steðgin var lítið av samanhangandi spæli*

Burtursæð frá síðani 1997, tá B36 vann FM, hevur havnarliðið ongantíð staðið seg nakað serligt á Svangaskarði. Fyrsta løtan sunnudagin boðaði ikki frá, at tað skuldi vera nakað serligt.

B36 tapti, men tað gjørdist ikki tað sorlið, sum B68 tóktist ætla sær fyrstu løtuna. Tá vóru teir á heimaliðnum ágangandi, og teir fingu fult burturúr móti einari tøvandi og skinklutari verju.

Tað gekk skjótt at fáa trý mál. Marcello Marcelino gjørdist púra leysur og skoraði, eftir at Egil Zachariasen (tað kennist rangvørt, at hann skal spæla so aftarlaga) heilkiksaði.

Næsta málið var eitt av tí slagnum, sum tað altíð fara at verða ymsar áskoðanir um. Báðir álopsmenninir hjá B68 vóru í rangstøðu, tá bólturin varð sendur fram eftir miðásinum. B36 verjan roknaði við, at dómarin fór at bríksla, men tá hvørgin B68 maðurin tóktist áhugaður í bóltinum, tagdi dómarin, og so streyk Fróði Benjaminsen avstað og setti framvið sakleysa málverjanum.

Triðja B68 málið var sera vakurt og boðaði frá uppaftur fleiri. Eftir at bóltryggu veruspælararnir høvdu spælt væl og leingi saman, setti Jan Petersen ferð á í høgru, Marcello Marcolino legði innfyri, og Súni Fríði Johannesen var púra leysur mitt fyri málinum, tá hann við høvdinum stýrdi bóltinum í kassan.

24 minuttir vóru farnir, og gongdin bendi á stórsigur. Men lukkutíð fyri B36 minkaðu teir um munin í sama minutti. Rangstøðan hjá B68 kiksaði, og Jákup á Borg, sum kom ígjøgnum eitt sindur til høgru, har B68 tóktist tunnligt, skoraði.

Tá tað var 2–0 varð John Petersen togaður niður í brotsteiginum. Einki hoyrdist frá dómaranum, men hann var skjótur, tá uppspæl í vinstru endaði við, at John Petersen lá flatur. Magnus Poulsen hevði hondina á skotinum hjá John Petersen, sum var liðformaður, men bólturin smeyg sær um linjuna.

Í løtum í 1. hálvleiki hekk tað hampuliga saman – serliga hjá heimaliðnum fyrra partin av umfarinum. Eftir steðgin var lítið av samanhangandi fótbóltsspæli. B36 flutti nógv fólk fram, men einki spurdist burturúr.

B68: Magnus Poulsen – Jan Petersen, Jan Dam, Arnbjørn Danielsen, Jákup Eli Olsen – Fróði Benjaminsen, Marlon Jorge, Øssur Hansen, Eyðstein Skipanes – Marcello Marcolino, Súni Fríði Johannesen

B36: Tróndur Vatnhamar – Carl H. Høgnesen, Herbert í Lon Jacobsen, Egil Zachariasen, Jens Kristian Hansen, Håkan Lunnholm – Jan Guttesen, Mikkjal Thomassen, Magni á Lakjuni – John Petersen, Jákup á Borg

JH

Fróði Benjaminsen skeyt málið til 2-0, tá B36 roknaði við, at tveir aðrir toftamenn vóru rangstaddir

GÍ fekk bert eitt stig, tá teir um vikuskiftið vitjaðu vesturi í Sørvági

Tað gongur rætta vegin hjá FS Vágar

Løgmanssteypið: *Tað sæst væl aftur á spælinum hjá gøtumonnum, at teir síðani í fjør hava mist nígggju spælarar*

Fyri nøkrum vikum síðani var GÍ í Vágum og spældi venjingardyst. Tá ferðina vann GÍ 4–0. Sunnudagin var GÍ í Miðvági, og tá endaði tað 1–1. Úrslitið boðar frá, at tað gongur rætta vegin hjá vágamonnum, sum tykjast hugagóðir og have fingið nógv burturúr teimum fýra spælarunum, sum teir hava fingið úr Litava.

Avrikið boðaði eisini frá, at tað ikki stendur so væl til hjá GÍ. Nígggju spælarar, sum vóru við í fjør, eru ikki tøkir í løtuni, og tað er sjónskt. Serliga meint er tað, at landsliðsmenninir Sámal Joensen og Henning Jarnskor eru farnir til Íslands. Og so er tað steinur omaná byrðu, at Poul Ennigarð nú er farin til Danmarkar at ganga í tekniskan skúla. Hann verður ikki aftur fyrrenn 1. juli.

Tvey mál komu í Vágum. Óli Hansen vann luftdyst við málverjan hjá heimaliðnum og skoraði. Tá var seinna umfarið fimm minuttir gamalt. Sambært dómaraseðlin javnaði FS Vágar tveir minuttir seinni, og sambært sama seðil var tað ein spælari, sum ikki kom á vøllin, ið javnaði. Sambært eygnavitnum var tað John Johansen, sum javnaði, og tað gjørdi hann seytjan minuttir eftir fyrra málið.

Í gjøgnumbroti hjá FS Vágum í høgru gjørdu gøtumenn fríspark. Dómarin gav – sum rætt var – vágamonnum fyrimun. Linjuverjin veittraði, og tað var Rúni Justinussen (er nústaðni komin við aftur í ár) so upptikin av, at hann ikki sendi bóltin burtur, tá innleggið kom innfyri. Bólturin endaði hjá John Johansen, og so var javnt.

Í 2. hálvleiki kom Sonni Johansen hjá FS Vágum inn á miðvøllin, og Johan Nielsen skifti Poul Henning Jacobsen inn fyri smáskadda Magna Jarnskor.

FS Vágar: Remi Mikotionis – Heðin Joensen, Zilva Zudis, Darius Magdisauskas, Jack Johansen – Hannus Olsen, Tór–Ingar Akselsen, Albert Ari Thomassen, Rimvadis Bakus – Birgir Joensen, John Johansen

GÍ: Sunvard Joensen – Rúni Justinussen, Bartal Eliasen, Jónreid Dalheim, Súni Olsen – Magni Jarnskor, Áslakur R. Petersen, Pauli Jarnskor – Helgi L. Petersen, Óli Hansen, Hans Pauli Petersen

JH